# n stór og sterk eind


...ni, sum nú er víðkað eisini til vestara arm á Skálafjørðinum

Hann vísir her til Skála, har ein miðvíst hevur lagt seg eftir at kunna nøkta tørvin á grundøkjum.

### Á odda í skúlaviðurskiftum

Skúlaviðurskiftini í kommununi er eitt, ið borgarstjórin er nógv upptikin av. Hann vísir á, at í undanfarna býráðið var eitt ávíst arbeiði gjørt við at minka um skúlaeindirnar, fyri at fáa eitt betri skúlaverk og við minni flutningi av skúlabørnum.

Eitt annað er, at skúlabørn í Oyndarfirði og á Skála ganga í 8. til 10. flokk á Strondum. Henda skipanin hevur virkað væl, men fer eisini at verða hugd eftir í framtíðini.

Tá tað snýr seg um tey brekaðu og menningartarnaðu hevur kommunan í stóran mun sjálv loyst øll málini. Hetta hevur hon gjørt m.a. at útgerða skúlan í Lamba til hetta og í Søldarfirði, har partar av skúlunum eru tiknir burturav til undirvísingina av hesum børnum.

Tað er tí ikki av leið, sum sagt verður í seinastu útgávuni av MBF-blaðnum, at Runavíkar skúli hevur gingið á odda tey seinastu 25 árini við at geva børnum við serligum tørvi eitt skúlatilboð á staðnum, har næmingurin býr ella har hann ynskir at ganga í skúla Rodmundur hugsar ikki bert um tey »vanligu« skúlaviðurskiftini í kommununi, sum hann stjórnar. Hann heldur, at nógvir av skúlaspurningunum fyri hesi børnini við serligum tørvi, eiga at verða loystir av øllum kommunum í Eysturoynni. Ikki hvør í sínum lagi.

– Eg vil siga, at higani er ein góður vilji til at tosa saman um hesi viðurskiftini, men enn vantar so tann landspolitiski viljin til at koma eitt fet víðari.

Hann vísir á, at í Søldarfjarðar skúla eru tvær skúlastovur settar av til menningartarnaði børn og í skúlanum í Lamba ganga í løtuni tríggir næmingar – tveir við fjølbreki og ein við autismu.

Í løtuni fer fram ein útbygging av skúlanum í Oyndarfirði, og á Skála er ein sera góður skúli, sum lýkur øll krøv. Í Funningsfirði er eisini ein góður skúli við góðum karmum. Har kundi ein tó ynskt sær uppaftur fleiri skúlabørn.

### Trýst á miðstaðarøkið

Íløgukarmurin hjá Runavíkar kommunu er umleið 19 mió. kr. í ár. Og her eru mong viðurskifti, ið skulu setast í gongd ella sum bøtast skal um.

Eitt mál, sum altíð er viðkomandi í slíkum viðurskiftum er lendi til sethús. Her er kommunan í teirri støðuni, at grundøki eru tøk í øllum kommunum. Men tað undrar neyvan nakran, tá sagt verður, at størsta trýstið er á miðstaðarøkið í Runavík og Saltangará.

Í løtuni er ein bíðilisti eftir grundøkjum við beint omanfyri 30 umsóknum, men spurningurin er, um her er talan um fólk sum eru sinnaði at fara undir bygging alt fyri eitt ella tey bíða til seinni. Ein ítøkilig ætlan um útstykking liggur í løtuni klár uppi á Høgaleiti, har ætlanin er at fara til verka í summar. Hinvegin eru eisini smærri útstykkingar í teimum smærru bygdunum í kommununi. Í løtuni standa t.d. tvey sethús í gerð lið um lið í Rituvík.

Fyri Rodmund er eingin ivi um, at møguleikin hjá fólki at fáa grundøki er samanbundin við vøksturin í fólkatalinum á staðnum.


*– Vit skulu nú læra okkum at hyggja út um okkara egna sandkassa, og læra okkum at hugsa, at henda stóra kommunan nú skal savnast til eina stóra og sterka eind, sigur Rodmund Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu*

## Tríggjar staðbundar nevndir

Til tess at røkka áhugamálunum hjá øllum borgarum í teirri stóru kommununi hevur Runavíkar kommuna nú valt staðbundnar nevndir fyri Skála, Oyndarfjørð og Elduvík.

Endamálið við hesum nevndum er at vera sum ein ráðgevandi nevnd í lokalum málum.

Í nevndirnar eru hesi fólkini vald:

**Skálanevndin:**
1 Gunnvør G. Hansen
2 Petur Poulsen
3 Súni S. Kristiansen

**Varalimir:**
1 Jens Bech
2 Ruth Olsen

**Fyri býráðið eru vald:**
Rodmundur Nielsen og Kári Johannesen
**Varalimur:** Asbjørn Mikkelsen

**Oyndarfjarðarnevndin:**
1 Erika L. Petersen
2 Hallur Ellingsgaard
3 Ingeborg Jacobsen

**Varalimir:**
1 Louis Houman
2 Janhild Olsen

**Fyri býráðið eru vald:**
Rodmundur Nielsen og Kári P. Højgaard
**Varalimur:** Hans J. Lamhauge

**Elduvíkarnevndin:**
1 Michael Pattinson
2 Dánjal Martin Hansen
3 John Kjeld

**Varalimir:**
1 Frida Reyná
2 Hans P. Hansen

**Fyri býráðið eru vald:**
Rodmundur Nielsen og Ólavur Asafsson Olsen
**Varalimur:** Klæmint Østerø

Rodmundur Nielsen er føddur formaður í hesum nevndum. Ætlanin er, at tær skulu hava sínar fyrstu fundir í komandi.